





*Teir seks leikarnir hava allir minst tveir leiklutir. Í løtum, kann tað vera trupult at halda skil á, hvør er hvør, men tað hevur minni at týða*

*Mynd: Maria Olsen*

Sleeping around:

# Skelkandi moralskt

**»Niðurbrótandi siðspilla« var ein av dómunum, ið hótti við at kvala nýggja leikin Sleeping Around í føðingini. Men leikurin yvirlivdi, fullur av banniorðum, á tremur við sex og við einum boðskapi, ið gevur moralinum ein seinasta kjans**

SJÓNLEIKUR/ UMMÆLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Sleeping Around er ímyndin av einum sundurpettaðum heimi, har menniskju eru programmerað til at reika friðleys runt, tí lívið er ein millumstøð, og materialisma er Gud. Lýsingar hava hertikið mánan, har eitt Colamerki stendur og blinkar, og á jørðini eru menniskjuni vorðin tilvildarlig hagtøl. Tað ræður um at fylgja rákinum og minnast til, at menniskju, eins og aðrar vørur, skulu brúkast, áðrenn seinasta søludag.

## Onki innaní

Teir seks leikarnir hava allir minst tveir leiklutir. Í løtum, kann tað vera trupult at halda skil á, hvør er hvør, men tað hevur minni at týða. Hetta eru menniskju, sum skifta samleika alt eftir, hvør støðan er - sum vørur, ið laga seg eftir eftirspurningi. Tey eru zombies, líka sum brúnu pakkarnir, Kate stendur og pakkar upp, bert fyri at finna uppaftur fleiri akkurát líka brúnar pakkar innaní inntil hon kemur inn í kjarnuna: Eitt telduspæl við eini barnarødd, ið er programmerað til at siga: »Eg elski teg, mamma.«

Menniskju eru sum Coladrykkirnir, Greg skal døma í eini royndarsmakking. Allir smakka líka, men ein líkist framtíðini - tóm, bleik og fær tenninar at rotna. Tað hjálpir ikki, at Annie biður hann samanlíkna drykkirnir við eitt konufólk, hann kundi hugsað sær at farið í song við. Hann ivast, og tað er tað ikki pláss fyri, á spurnarblaðnum hjá Annie. Har skulu Coladómarnir hóska inn í teigarnir á spurnarblaðnum. Um ikki, kunnu teir ikki brúkast.

## Lívið er ein breyðristari

Greg hóskar heldur ikki inn í heimin hjá Helen, tí hon trýr uppá eydnuna. Á útferðini saman við Greg tosar hon um góða veðrið og fuglaljóð, meðan hann savnar seg um stødd og lit á hundalortum. Hvussu kann hon droyma um at verða lukkulig? Sambært Greg eru góðu løturnar at líkna við ein breyðristara. Teir hava bert eitt ávíst haldføri, so verður tú noyddur at keypa tær ein nýggjan. Greg heldur allatíðina eyga við seinasta salgsdegi og gongur tí við fleiri urum uppi á sær. Í eini ørkymlaðari roynd at bjarga løtuni og samveruni flytur Helen urið hjá Greg aftur, men sannføringin um avmarkaða haldvirðið av góðu løtunum hevur etið seg inn í hann. Hann fær kvett løtuna av, meðan tíð er, og fer víðari, víðari …

Aids-sjúki Pete verðu settur fram, sum eitt náðileyst prógv um, at Greg nokk hevur rætt. Flogternan Lorraine veit eisini, at lívið bert er smáir steðgir á leiðini, og tað kann kanska ugga Pete, sum veit, at ævinleikin er størsta ræðslan.





*Aids-sjúki Pete verðu settur fram, sum eitt náðileyst prógv um, at Greg nokk hevur rætt. Flogternan Lorraine veit eisini, at lívið bert er smáir steðgir á leiðini, og tað kann kanska ugga Pete, sum veit, at ævinleikin er størsta ræðslan*

*Mynd: Maria Olsen*

## Sex ella orð

Kenda In-yer-face leikskaldið Anthony Neilson varð einaferð spurdur, hví hansara leikir altíð snúðu seg um sex. »Av somu orsøk sum eg altíð brúki orð í mínum leikum. Sex er ein máti at lýsa samskiftið millum menniskju.«

Persónarnir í Sleeping Around royna seg við sex, tá orð ikki røkka longur. Ella í staðin fyri orð. Hvørki riggar, og leysrivnu sexsenurnar fáa bara meiningsloysið at stinga djúpari. Tær eru allar kaldar, kyniskar og ógvusligar, men tær skaka ongan í einum umhvørvi, har alt hevur mist sín týdning. Og tað er skakandi.

## Ongin útgongd

»Sleppið allari vón, tit, ið trína inn higar.« Soleiðis ljóðar fyrsti setningur í modernaða ræðuklassikaranum American Psycho. »Inn higar« er inn í ein sjúkan heim, har kensluloysið og kynisman ráða, tí moralurin er farin í upployusn. Í eini seinastu roynd at vekja eitthvørt í hesum heimi, fortelur høvuðspersónurin og seriudrápsmaðurin sínum vinfólkum út í æsir, hvussu hann pínir og drepir fólk um náttina. Men ongin reagerar, ongin vaknar, tí har er onki at vekja. Vónloysið hevur tikið yvir, tey eru fangað frammanfyri einum skeltiteksti og seinasta setninginum í bókini, ið sigur: »Hetta er ikki ein útgongd.«

Eg dugi heldur ikki rættiliga at hóma nakra útgongd í Sleeping Around. Sami persónur, sum byrjaði fyrsta leikin byrjar eisini seinasta leikin. Onkursvegna tykist leikurin bert at vera enn ein byrjan í ein endaleysari ringrás av somu leikum. Og tó - fyri fyrstu ferð hýsir Sarah, ímillum øll síni hagtøl, tankanum um, at tað er synd í einum øðrum menniskja, eini kvinnu, sum eitur Jane. Men Jane er ein ævintýravera og Sarah er skít. Og vit vita væl, at fullum fólkum og ævintýrum, skulu vit ikki trúgva.

## Størsta ræðuløtan

Vandin við einum sjónleiki, ið skal lýsa eitt lív í tómgongd er, at leikurin sjálvur fer í tómgongd. Hesin vandin liggur eisini allatíðina og lúrir í Sleeping Around, men bert til áskoðarin fær ætlaða varhugan av keðsemi. So verður leikbrotið kvett av, og eitt nýtt kemur í staðin.

Hetta ber til inni í leikinum, men spurningurin er, hvussu leingi tað ber til at seta nakað nýtt inn í In-yerface leikgreinina. Endamálið við henni er at tveita eirindaleysar sannleikar upp í andlitið á áskoðaranum og soleiðis skaka hann til at taka moralska støðu. Mátin er at taka mest víðgongdu hendingar og atburð, vit kunnu ímynda okkum, eitt fet longur. Spurningurin er, hvussu langt tað ber til at fara.

Men kanska er júst hetta tann mest víðgongdi sannleikin, leikgreinin vil fortelja. Greinin yvirlivir, so leingi eitt vet av morali er eftir at taka støðu út frá og í mun til. Løtan, tá tað ikki ber til longur, er løtan, tá allur moralurin er fokin.

Og hon er mest skakandi ræðuløtan av øllum.



**– Tað er við ambivalentum kenslum, at eg nú taki sæti á Fólkatingi. Endamálið hjá okkum er, at vit ikki skulu hava hesa umboðanina, og tí er tað er ein andsøgn í sær sjálvum, segði formaður Tjóðveldisfloksins Høgni Hoydal, tá hann loysti Tórbjørn Jacobsen av í Fólkatinginum**



*Svend Auken sigur Tobba farvæl og ynskir Høgna vælkomnum uttanfyri Fólkatingið fríggjadagin*

*Mynd: Símun J. Hansen*

# Høgni tekur sæti á Christiansborg

FÓLKATINGIÐ
*Stefan í Skorini,*
*Keypmannahavn*
*stefan@sosialurin.fo*

Seinastu tjúgu mánaðirnar av hesum valskeiðnum verður tað Høgni Hoydal, sum saman við Lisbeth L. Petersen fer at umboða Føroyar í Fólkatinginum. Tórbjørn Jacobsen hevur sum næst valdi á tjóðveldislistanum røkt starvið, meðan Høgni Hoydal sat í landsstýrinum, men tá Tjóðveldisflokkurin endaði í andstøðu eftir seinasta løgtingsval, fer Høgni nú aftur á Fólkating.

Grækarismessudag var lítil samkoma á Christiansborg, sum markeraði vaktarskiftið í Norðuratlantsbólkinum.

## Nýta allar møguleikar

Tjóðveldisflokkurin hevur eitt ambivalent forhold til umboðanina á Fólkatingi, tí flokkurin í veruleikanum stríðist ímóti eini slíkari umboðan. Men Høgni Hoydal rættvísger umboðanina við at vísa til endamálið.

– Tjóðveldisflokkurin vil nýta allar møguleikar fyri at røkka okkara endamáli. Hetta er eitt kærkomið høvi, har vit kunnu vísa dønum, hvat sjálvstýrisrørslan í Føroyum stendur fyri. Nógvir danir og danskir politikarar vita ógvuliga lítið um Føroyar, og vit vilja greiða teimum frá, at tað er ikki ein spurningur um at vera ímóti Danmark, men hinvegin um at vinna fult sjálvræði, greiðir Høgni Hoydal frá, tá hann verður spurdur nærri um tað prinsipiella í umboðanini.

– Vit halda, at Føroyar ikki eiga at hava sess í danska tinginum, og at Danmark einki lóggávuvald eigur at hava í Føroyum. Vit sita her við tí endamáli at avtaka sessin, leggur Høgni Hoydal afturat.

Tað var fyrst í sjeytiárunum, at Tjóðveldisflokkurin broytti støðu og stillaði upp til fólkatingsval, eftir at flokkurin tey fyrstu árini ikki vildi vita av tí føroysku umboðanini í Keypmannahavn. Erlendur Patursson varð valdur tvær ferðir- í 1973 og 75 - men síðani hevur Tjóðveldisflokkurin ikki verið umboðaður í Danmark fyrr enn við síðsta val í 2001.



*Høgni Hoydal hevur nú sett seg í fólkatingsessin, sum Tórbjørn Jacobsen hevur røkt síðani fólkatingsvalið 21. november í 2001*

*Mynd: Símun J. Hansen*

## Norðuratlantsbólkurin

Høgni Hoydal stovnaði saman við teimum báðum grønlendsku fólkatingslimunum, Kuupik Kleist úr Inuit Ataqatigiit og Lars-Emil Johansen úr Siumut, Norðuratlantsbólkin, og hesir tríggir umboða nú ein sjálvstøðugan tingbólk.

Endamálið hjá bólkinum er at arbeiða fyri føroyskum og grønlendskum sjálvstýri á Fólkatingi.

– Fólkatingið er eitt sera væl skipað parlament. Ein slíkur bólkur fær ógvuliga góðar fíggjarligar karmar at arbeiða undir, og tað gevur bólkinum nógvar møguleikar í sínum politiska virksemi, greiðir Høgni Hoydal frá.

Bólkurin hevur tí sett ymsar kanningar í verk. Eitt nú hevur bólkurin kannað fólkarættarligu støðuna hjá Føroyum, og tann kanningin verður almannakunngjørd einaferð í vár. Eisini eru ætlanir um at kanna búskaparliga sambandið millum Føroyar og Danmark, og ein kanning um tey hernaðarligu viðurskiftini innanfyri ríkisfelagsskapin verður eisini leysliga nevnd.

## Komandi mál

Høgni Hoydal hevur nakrar ætlanir, sum hann ætlar at føra út í lívið á Fólkatingi.

– Vit ætla at leggja eitt lógaruppskot fyri Fólkatingið, sum skal staðfesta, at Føroyar og Grønland eru tjóðir við teimum altjóða rættindum, sum tað gevur, sigur Høgni Hoydal. Endamálið er, at allar samráðingar millum Føroyar og Danmark mugu ganga fyri seg eftir altjóða spælireglum.

– Sum støðan er nú, kann danska stjórnin avgera alt. Tað er sum at spæla ein dyst uttan vøll og dómara, sigur Høgni Hoydal.

Spurdur um tað ikki bert er spæl fyri gallarínum at leggja lógaruppskot fyri Fólkatingið, sum eru deyðadømd frammanundan, svarar Høgni Hoydal, at fólkatingsbólkurin skal gera eitt umfatandi kunningararbeiði, áðrenn lógaruppskot verða løgd fram. Høgni Hoydal heldur fast við, at lógaruppskotini skulu vera realistisk, og møguleiki skal vera fyri einum positivum úrsliti sæð frá teirra sjónarhorni.

Hetta umfatar eitt sokallað lobby-arbeiði, har fólkatingslimir og ráðharrar fáa upplýsingar og kunning um málini, sum verða løgd fram til viðgerðar.

Harumframt hevur Norðuratlantsbólkurin ætlanir um at fáa eitt aðalorðaskifti í Fólkatinginum, sum skal útgreina, hví Danmark framvegis vil varðveita yvirvaldsrættin yvir Føroyum og Grønlandi.

Av smærri málum hevur hann ætlanir um at staðfesta tað føroyska málið sum eitt tjóðarmál og ikki bert sum eitt landspartamál. Hetta málið var frammi fyri nøkrum árum síðani, tá danska stjórnin í einum ES-sáttmála staðfesti, at føroyska málið er eitt økismál í tí danska ríkinum.

Táverandi landsstýri, sum Høgni Hoydal var partur av, kravdi, at danska stjórnin boðaði frá í ES-høpi, at føroyskt er tjóðarmál og almenna málið í Føroyum, men hesum sýtti danska stjórnin fyri.

**Fakta**

### Fólkatingsumboðan síðani 1973

| | |
|---|---|
| 1973: | Johan Nielsen, Javnaðarflokkurin<br>Erlendur Patursson, Tjóðveldisflokkurin |
| 1975: | Johan Nielsen, Javnaðarflokkurin<br>Erlendur Patursson, Tjoðveldisflokkurin |
| 1977: | Johan Nielsen, Javnaðarflokkurin<br>Pauli Ellefsen, Sambandsflokkurin |
| 1979: | Pauli Ellefsen, Sambandsflokkurin<br>(Johs. M. Poulsen meðan PE var løgmaður 1981-85)<br>Jákup Lindenskov, Javnaðarflokkurin |
| 1981: | Pauli Ellefsen, Sambandsflokkurin<br>Jákup Lindenskov, Javnaðarflokkurin |
| 1984: | Pauli Ellefsen, Sambandsflokkurin<br>Óli Breckman, Fólkaflokkurin |
| 1987: | Óli Breckman, Fólkaflokkurin<br>Atli P. Dam, Javnaðarflokkurin<br>(Jákup Lindenskov meðan A.D var løgmaður 1985-89) |
| 1988: | Óli Breckmann, Fólkaflokkurin<br>Pauli Ellefsen, Sambandsflokkurin |
| 1990: | Atli Dam, Javnaðarflokkurin<br>(Jákup Lindenskov meðan AD var løgmaður 1991-93)<br>Óli Breckmann |
| 1994: | Edmund Joensen, Sambandsflokkurin<br>(Johs. M. Olsen meðan EJ varløgmaður 1994-98)<br>Óli Breckmann, Fólkaflokkurin |
| 1998: | Óli Breckmann, Fólkaflokkurin<br>Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin |
| 2001: | Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin<br>Høgni Hoydal, Tjóðveldisflokkurin<br>(Tórbjørn Jacobsen meðan HH var landsstýrismaður 1998-2003) |